Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Kalla 90 ár

**Í dag fyllir Kalla Samuelsen í Klaksvík 90 ár. Hóast høga aldurin, er hon enn áhugað í øllum tí sum rørist í samfelagnum**

FØÐINGARDAGUR

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Í dag fyllir Kalla Samuelsen í Klaksvík 90 ár*

Í dag kann Kalla Samuelsen í Klaksvík hátíðarhalda sín nítára føðingardag. Hóast høgan aldurin, er hon púra klár og áhugað í øllum tí, sum rørist í samfelagnum.

Karolina Maria er dóttir Armgarð og Dávur Joensen í Klaksvík. Í 1933 giftist hon Petur Juul Samuelsen, sum var úr Leirvík. Tey fingu 6 børn, Sigrun, Gunnvør, Ásgerð, Rakul, Oddmar og Armgarð. Kalla eigur 11 ommubørn, og langommubørnini eru eisini 11 í tali.

Kalla býr enn í heimi sínum, har hon og Petur Juul á ungum árum settu búgv, nær barnaheimi hennara á Vágsheygnum.

Sum vanligt tá í tíðini, lærdi Kalla at arbeiða frá ungum av. Tey vóru nógv systkin, so har máttu nógvar hendur til, skuldi alt tað húsliga fáast frá hondini.

Men tað fall lætt hjá Kallu, sum ikki bara er eitt arbeiðsgrev, men eisini eitt serstakliga positivt menniska. Hon er ein av teimum, sum altíð er við tí góða orðinum. Tú hoyrir hana heldur ongantíð sigur eitt ilt orð um nakran.

Petur Juul hevði snikkaraverkstað, og búðu mangir lærlingar hjá teimum á Vágsheygnum. Seinni tá ið Petur Juul fekk sær heilsølu, og børnini vóru undankomin, hjálpti Kalla til við søluni og pappírsarbeiði í heilsøluni.

### Túsundkunstnari

Kalla dugir alt og er sera fitt í hondunum. Tað er ikki smávegis av handarbeiði komið frá hennnara hond. Eitt nú broderar hon enn og tað, hon ger, er líka vakurt á ranguni sum á rættuni. Og hevur hon ikki stokkar ella nál millum fingrarnar, so loysir hon krossorðagátur ella leggur kabal.

Grønu fingrarnar hevur Kalla arvað frá forfedrum sínum, og tað sæst eisini aftur á vakra urtagarðinum uttan fyri húsini.

Kalla fostraði ommusonin Jørgen Dahl upp. Jørgen kenna mong frá tónleikinum. Tað gekk ikki altíð so friðarliga fyri seg, tá hann vandi, men hon var tolin, og væl spurdist burtur úr hjá ommusoninum.

Nú tyngjast fetini hjá Kallu, men enn sæst hon hvønn morgun fara til gongu í grannalagnum á Vágsheygnum, har hon hevur livað og virkað alt sítt lív.

# Maskinmeistaraprógv fyri 25 árum síðan

**Í juni 1978 fingu ellivu maskinmeistar prógv á Føroya Maskinskúla.**



*Fremra rað f.v.: Hákun Andreasen, Klaksvík, Bergur Jacobsen, Tvøroyri, Martin Jacobsen, Porkeri, Tom Johannesen, Leirvík, Rasmus Magnussen, Søldarfjørður.*
*Aftara rað f.v.: Eilif Mørkøre, Eiði, Carl Nielsen, Klaksvík, Ólavur Asafsson Olsen, Søldarfjørður, Marner D. Petersen, Fuglafjørður, Pól Rasmussen, Søldarfjørður, Sonny Z. Zachariassen, Hov.*
*Kelda: Myndaárbókin "árið ið fór" 1978*





Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Eyðun og Irena Christiansen aftur í Vági



Tað eru nú liðin 5 ár síðan Eyðun og Irena Christiansen vóru leigarar fyri samkomu Frelsunarhersins í Vági. Tey fluttu til Danmarkar, og seinastu árini hava tey verið búsitandi í Esbjerg. Nú leita tey so heim aftur til Føroya.

Frelsunarherurin hevur givið teimum leiðsluna av arbeiðinum í Suðuroy, Sandoy og Vágum frá 28. september 2003. Hølisumstøðurnar hava verið vánaligar í Vági, men 26. mars 2004 skulu nýggj hølir innvíðast. Tað hevur altíð verið nógv barna- og ungdómsarbeiði í Frelsunarherinum í Vági, tí kemur tað væl við at fáa nýggj hølir. Feltsersjantarnir Eyðun og Irena Christiansen verða innsett sum korpsleiðarar á almennum fundi sunnukvøldið 28. september 2003.

## Jacoba Samuelsen 75 ár



Í dag, hósdagin 25. september, fyllir Jacoba Samuelsen, f. Kjærbo, Tórshavn, 75 ár. Jacoba er fødd í Sumba, foreldur hennara vóru Jensia, f. Jensen, ættað úr Kristinhúsi í Froðba, og Jacob Kjærbo, vanliga nevndur Jákup Eystan Á, úr Sumba.

Í 1948 giftist Jacoba við Reidar Samuelsen, timburmanni, úr Havn. Tey bygdu sær hús á Gripsvegi og fingu tríggjar døtur og ein son. Ein dóttir býr í Danmark, tvær í Havn og sonurin í Noreg. Reidar doyði 74 ára gamal, 25. oktober 2002.

Jacoba er burturstødd føðingardagin.

# Svein Rógvi Nielsen framleiðslutøkningur



*Egon Øregaard, stjóri á Tekniska Skúla, handar her Svein Rógva Nielsen prógv sum framleiðslutøkningur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 24. september fekk Svein Rógvi Nielsen handað prógv á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Svein Rógvi Nielsen var hann sum átti hugskotið til at útnevna Ársins arbeiðspláss í Føroyum, og hevur hann í hesum sambandi skrivað eina verkætlan um tað.

Ársins arbeiðspláss bleiv valt tann 13. juni 2003, og vóru tað tey fimm arbeiðarafeløgini í Føroyum sum valdu vinnaran.

## Torbjørn Michelsen 50 ár



25. september verður ein av teim hugfarsligu kúllunum á Landavegnum 50 ár. Aftaná lokið studentsprógv var hann eina tíð og hjálpti Bjarna Húsgarð í Fruktsøluni at veita borgarunum røtur og purrur o.m.a.

Uttan at hava nortið sær nakra verkfrøðingaútbúgving er hann í dag ein av heilunum í tí framkomnu fyritøkuni Nomatec, har hann teknar, dimensionerar og fyrireikar arbeiðini til handverkararnar. Á Landavegnum liggur hansara partur ikki eftir tá hann ágrýtin ár um ár, saman við Mohrarunum og hinum smádreingjunum fyrireikar flottasta nýggjársbálið í býnum.

Og ein fýrkantaður Landavegsdrongur ert tú als ikki. Alt tað góða tú hevur givið okkum í vinafjøldini er ikki at forsmáa.

**- ein vinur**




## 90 ÁR

Í dag, 25. september, fyllir Niels Pauli Djurholm, Kollafirði, 90 ár.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Dagurin

**25. september. Kleofas.** Annar av lærusveinunum, sum á veg til Emmaus hitti hin upprisna (Luk. 24, 13-35).